# Kyndil tapti og vann

**Kyndils-kvinnurnar spældu tveir dystir hetta vikuskiftið, sum annars varð órógvað rættiliga nógv av arbeiðssteðginum á almenna arbeiðsmarknaðinum**

SUNSET-KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Upprunaliga skuldi talan verða um dupult-umfar um vikuskiftið, men arbeiðssteðgurin hevði við sær, at bara tveir dystir vórðu avgreiddir, og í báðum førunum var Kyndil annar parturin.

Leygardagin spældu tær grønu grannauppgerð móti Neistanum, og her vunnu tær bláu ætlaða favoritt-sigurin.

Longu tíðliga í dystinum gjørdu tær bláu greitt, at her skuldi einki ivamál verða, og tó at tær settu ferðina niður eftir steðgin, so gjørdist talan ongantíð um nakra spennandi uppgerð.

Spenningurin var heldur ikki tann stóri sunnudagin, tá Kyndil spældi móti StÍF, men hesaferð vóru forteknini øvugt. Kyndil legði bragdliga fyri9, og eftir at tær tíðliga í dystinum høvdu vunnið seg eini 6-7 mál framum, hildu tær alla tíðina fast um leiðsluna.

**Úrslitini**

**Neistin-Kyndil 29-17 (18-9)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Nicoleta R. Hansen 7, Mildrið Jacobsen 6, Rakul Augustinussen 5(4), Annika Ljósstein 4(1), Birita Wardum 3, Annika Thomsen 3, Susan Brockie 1
**Kyndil:** Lina Andriulyte 8, Jórun Ludvig 3(2), Ronja M. Mikkelsen 3, Anja Heinadóttir 2, Linda Weihe 1
**Brotskøst:** Neistin 8, Kyndil 2
**Útvísingar:** Neistin 2, Kyndil 4
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

**Kyndil-StÍF 28-20 (14-9)**
**Málskjúttar**
**Kyndil:** Anja Heinadóttir 9, Randi S. Wardum 5, Jórun Ludvig 5(2), Súsanna Petersen 4, Lina Andriulyte 2, Linda Weihe 1, Ronja M. Mikkelsen 1, Hildur Høghamar 1(1)
**StÍF:** Ninna K. Johansen 7(1), Poula D. Olsen 6, Guðrun Ólafsdóttir 2, Rebekka Justinussen 2(1), Malan Petersen 1, Rósa Johansen 1, Ata Gregersen 1
**Brotskøst:** Kyndil 5, StÍF 2
**Útvísingar:** Kyndil 1, StÍF 3
**Dómarar:** Kristian Johansen & Sámal Paulason




*Intensiteturin var stórur, tá Neistin og Kyndil hittust á Hálsi leygardagin*

*savnsmynd*

# Toppurin líkist sær sjálvum

**Hjá monnunum eru Kyndil og VÍF nú fremstu liðini, so í so máta stendur alt við tað gamla**

ATLANTIC-AIRWAYS KAPPINGIN
*Jákup Mørk*

Tveir dystir vórðu spældir í bestu mansdeildini um vikuskiftið, og í báðum førum var talan um dystir, sum tóktust rættiliga spennandi á pappírinum.

**Kyndil vann grannauppgerðina**

Í Havn spældu Neistin og Kyndil, og ikki heilt óvæntað gjørdist tað her Kyndil, sum streyk avstað við sigrinum.

Neistin var annars væl við stóran part av dystinum, men fingu ongan tíð veruliga takið á grannunum, sum støðugt hildu seg beint framman fyri teir bláu. Um miðjan seinna hálvleik kom so av álvara hol í, og eftir hetta megnaði Neistin ongan tíð at svara aftur.

Sum tað sømir seg eini grannauppgerð, so var spælið eisini hampuliga hart til tíðir. Eitt nú fekk ein spælari hjá hvørjum liði beinleiðis reytt kort, og níggju ferðir máttu dómararnir vísa spælarunum tveir fingrar.

Tað vóru annars Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen, sum dømdu hendan dystin, og í ávísan mun er hetta eisini tekin um nýggjar tíðir í føroyskari hondbóltsdøming. Síðani dómarafelagið varð sett á stovn, hevur støðugt verið tosað um, at dómararnir eiga at umboða hetta, heldur enn ymsu feløgini, og tann leisturin er nú um at verða gjøgnumførdur. Í fjør vórðu nakrar royndir gjørdar í dystum, sum á pappírinum høvdu lítið upp á seg, men hetta var so fyrsta ferðin, at tað í einum týðandi dysti vóru dómarar, sum vanliga umboða annað av feløgunum. Og sum skilst, so spældi hetta eisini væl av.

**H71 misti á stokkinum**

H71 var á vitjan í Vestmanna, har heimaliðið skuldi reisa seg eftir ósigurin fyri Kyndli seinasta vikuskifti, og hetta eydnaðist eisini.

Hoyvíkingar høvdu annars leingi gott tamarhald á dystinum, og í steðginum vóru teir væl og virðiliga frammanfyri. Tann støðan helt sær eisini fram til seinastu tíggju minuttirnar, men tá gekk at kalla slettis einki hjá gestunum. VÍF broytti hesa seinastu løtuna støðuna frá 20-23 til 25-23, og so kundu hoyvíkingarnir bara iðra seg um tað, sum kundi verið. Samstundis sum teir máttu ásanna, at ein hondbóltsdystur altso verður spældur yvir samfullar 60 minuttir.

**Úrslitini**

**Neistin-Kyndil 24-28 (11-12)**
**Málskjúttar**
**Neistin:** Áki Mørk 5(2), Kenneth Hansen 4, Birgir Poulsen 3, Tróndur Kragesteen 3, Jón Ludvig 3, Bogi Berg 3, Blagoje Buha 2, Roar Dalsgaard 1
**Kyndil:** Josef Abrahamsen 7(1), Rókur Akralíð 6, Høgni Klein 6, Hans Áki Dal-Christiansen 6(1), Ragnar Stakksund 1, Poul R. Mohr 1, Ken Zachariasen 1
**Brotskøst:** Neistin 4, Kyndil 5
**Útvísingar:** Neistin 6, Kyndil 3
**Diskvalifikatión:** Neistin 1 (beinleiðis reytt), Kyndil 1 (beinleiðis reytt)
**Dómarar:** Eyðun Samuelsen & Andreas F. Hansen

**VÍF-H71 25-23 (12-16)**
**Málskjúttar**
**VÍF:** Sámal Joensen 8, Áki G. Olsen 4, Agnar Joensen 3(1), Daniel Rápa 3, Harald Bjørgvin 2, Jákup S. Andreasen 2, Rói Lamhauge 1, Rúni Joensen 1, Sjúrður Poulsen 1
**H71:** Halgir Dahl Olesen 7, Niels Viggo Niclassen 5, Heini Bendtsen 3, Tróndur Vatnhamar 3, Bjarni Sørensen 2, Johnny Durhuus 2, Olaf Vesturgarð 1
**Brotskøst:** VÍF 1
**Útvísingar:** VÍF 3, H71 4
**Dómarar:** Kristian Johansen & Sámal Paulason

